## Írar við havgølti

Í vikuni hava tvey írsk skip verið á Fuglafirði og landað tilsamans 3.000 tons av fiskaslagnum havgølti. Hetta er eitt fiskaslag, sum skipini fáa á einari leið í útsynning úr Írlandi, men sum føroysk skip eisini hava fingið aðrastaðni sunnanfyri. At írar landa fiskin í Fuglafirði kemst av, at Havsbrún er við í einari menningarverkætlan. Endamálið við verkætlanini er at kanna, hvussu stórurin stovnurin av havgølti er, hvussu nógv kann fiskast, og hvussu fiskurin skal handfarast. Av Havsbrún verður sagt, at havgøltur minnir um rossamakrel er heldur trupul at handfara og minnir í so máta um rossamakrel. Írsku skipini fáa um eina krónu fyri kilo av havgølti.



## Kenna framvegis kreppuna

Fyri nøkrum døgum síðani segði amerikanski tjóðbankastjórin, Ben Bernanke, at búskaparkreppan er komin á botn í USA, og at skjótt fer vend at koma í. Men nógv teir flestu amerikanararnir hava ilt við at síggja nakran bata. Tað sæst í einari kanning, sum sjónvarpsstøðin CNN hevur latið gera. Har siga 13 prosent, at bankastjórin hevur rætt, men heili 86 prosent siga, at kreppan er ikki av í USA enn. Níggju prosent av teimum spurdu siga, at teirra fíggjarstøða er batnað´tað seinasta árið, 52 prosent siga, at støðan er óbroytt, og 39 prosent siga, at hon er versnað.

# 157 túsund fyri uttanlandsferð

**157 túsund krónur kostaði tænastuferðin hjá Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í uttanríkismálum, og tveimum tænastumonnum til fýra smátjóðir**

FERÐING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Seinast í august og fyrst í hesum mánaðinum var landsstýrismaðurin í uttanríkismálum, Jørgen Niclasen, saman við Hákun J. Djurhuus og Jóannes V. Hansen, á tænastuferð í fýra ymiskum smátjóðum.

Tær smátjóðirnar vóru Liktinstein, Andorra, San Marino og Luksemborg. Ørindini vóru at hitta starvsfelagar landstýrismansins í uttanríkismálum og á fundum teirra millum at umrøða støðu smátjóða í Evropa mótvegis ES.

Farið varð úr Føroyum mikudagin 26. august og komið var heimaftur til Føroyar týsdagin 8. september.

Í sama tíðarskeiði hevði landsstýrismaðurin í uttanríkismálum eisini onnur arbeiðsørindi í útlondum, og tí eru partar av ferðaútreiðslunum tengd at teimum ørindunum, upplýsir Uttanríkisráðið.

Flogið varð ur Føroyum til Keypmannahavnar og haðani til Zurich, har gist var á hotelli. Úr Zurich var flogið til Barcelona og gist var á hotelli í Andorra. Úr Barcelona var flogið til Rimini og gist var á hotelli í San Marino. Úr Rimini gekk leiðin til Wien, og úr Wien víðari til Luksemborg, har gist var á hotelli. Úr Luksemborg varð ferðast til Brússel, har onnur arbeiðsørindi vóru, og haðani var flogið til Keypmannahavnar og víðari til Føroyar.

Samlaði kostnaðurin fyri tænastuferðina hjá landsstýrismanninum í uttanríkismálum og hinum báðum í fylginum vóru sambært teimum tølum, Uttanríkisráðið hevur latið okkum, fyri ferð, uppihald, dagpengar, luttakaragjøld og annað, 157.767 krónur.

### Umráðandi at knýta sambond

Uttanríkisráðið segði millum annað soleiðis í tíðindabrævi eftir ferðina.

Endamálið við fundunum var at umrøða felags avbjóðingarnar, sum Føroyar og hesar smátjóðir hava í mun til ES og teirra evropapolitikk.

- Eg haldi, at tað er sera týðandi fyri framtíðarstøðu Føroya í Evropu, at vit hava tikið upp samband við hesar smátjóðir á fyrsta sinni. Hóast londini á mongum økjum eru ymisk, hava vit eisini líkheitir. Liktinstein, San Marino og Andorra eru øll uttanfyri ES, og tey ynskja framhaldandi at vera uttanfyri ES, sigur Jørgen Niclasen

Jørgen Niclasen sigur víðari, at tey hava tó tað til felags við okkum, at tey ynskja tættari samstarv við ES, eitt nú um tey fýra frælsini. Sjálvur haldi eg, at smátjóðirnar kunnu læra av royndunum hvør hjá øðrum og við at hava dialog okkara millum, kunnu vit eisini taka lut í kjakinum í Brússel um framtíðarstøðuna hjá smátjóðum í evropiska bygnaðinum.

Londini hava avtalað at halda tættari samband, eisini var umrøtt at halda eina ráðstevnu um hetta í Føroyum til várs.



*Samlaði kostnaðurin fyri tænastuferðina hjá trimum umboðum úr Uttanríkisráðnum til fýra smátjóðir kostaði 157 túsund krónur vísa skjøl, ið Sosialurin hevur fingið innlit í. (Myndin tikin í øðrum samanhangi)*

Á fundunum hava uttanríkisráðharrarnir eisini umrøtt umhvørvisspurningar og tvískattasáttmálar. Øll londini hava stóran áhuga í at fáa í lag tvískattasáttmálar við Føroyar, og samráðingar um hetta eru við Fíggjarmálaráðið.

# Havsbrún ikki fingið so lítlan fisk síðani 1991

**Tað sæst aftur í ráfiskatølunu m hjá Havsbrún, at svartkjaftakvotan er minkað, og at størri partur av øðrum fiskasløgum fer til matna**

FISKIVINNA
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tað hevur verið óvanliga friðarligt á bryggjuni niðan fyri virkið hjá Havsbrún í Fuglafirði í ár. So friðarligt, at vit skulu 18 ár aftur í tíðina fyri at finna eitt ár, tá virkið fekk minni rávøru enn í ár.

Fyri bara fimm árum síðani setti Havsbrún met, tá virkið tók ímóti 330.000 tonsum av ráfiski og slógvi, men síðani er nøgdin minkað støðugt. Ein orsøk er, at svartkjaftakvotan er skerd nógv. Harafturat eru skip farin at fiska ein størri part av øðrum fiski til matna, samstundis sum einstøk skip viðgera fiskin umborð. Alt hetta gjørdi, at í fjør fekk Havsbrún 205.000 tons, og í ár kemur nøgdin neyvan langt upp um tey



*Havsbrún fær nógv minni fisk í ár enn undanfarin ár, og nøgdin verður uppaftur minni tey næstu árini*

100.000 tonsini. Og tann víkjandi svartkjaftfurin ger, at sambært stjóranum eru útlitini ikki tey bestu.

- Nei, vit vænta at fáa uppaftur minni fisk næsta ár og enn minni í 2011, sigur Bergur Poulsen við Sosialin.

### Hava repað

Burtursæð frá stórum tapi upp á alivinnuna fyri nøkrum árum síðani, tá Havsbrún misti nógvar milliónir krónur, hevur felagið altíð havt svørt tøl á niðastu reglu í roknskapinum, og hóast rávørunøgdin er minkað sera nógv, hevur stjórin vónir um, at tey niðastu tølini í roknskapinum fyri árið í ár vera røttu megin nullið.

Alivinnan hevur framvegis alstóran týdning fyri raksturin. Havsbrún var tað fyrsta fiskamjøl- og lýsivirki í heiminum, sum fór undir at gera alifóður, og í ár fer virkið ætlandi at framleiða millum 65.000 og 70.000 tons av alifóðuri. Men nú virkið fær munandi minni fisk enn fyrr, noyðist tað at innflyta fiskamjøl til fóðurframleiðsluna. Í fjør innflutti virkið 10 prosent av tí mjølinum, sum fór til fóður, men í ár verður umleið ein triðingur innflutt.

- Tað er klárt, at vit forvinna minni enn fyrr, men vit hava lagað raksturin eftir teimum broyttu umstøðunum, og tað fara vit framhaldandi at gera. Tí havi eg eisini í ár vón um eitt lítið avlop, sigur Bergur Poulsen.